

# OPAT




***Ein trítornaður psykopatur:*** *Úteftir smartur Manhattan yuppie, men hópdrápsmaður í loyndum. Høvuðspersónurin í bókini American Psycho frá 1991, Patrick Bateman, eftir Bret Easton Ellis. Her Christian Bale í høvuðsleiklutinum í filminum av sama heiti frá 2000. Hvørki bók ella filmur kunnu viðmælast!*

ídnastu, mest loyalu og idealistisku starvsfólkini, sum sostatt er ein serligur vandabólkur:

Ein dag fært tú boð um at gera uppgávurnar á ein ávísan hátt – dagin eftir fært tú boð um tað mótsetta.

Ein dag eru tit bestu vinir – dagin eftir ert tú ber luft.

Ein dag skulu reglurnar haldast – dagin eftir kunnu tær bendast.

## Trívist í kaos

Sálarfrøðingurin Paul Babiak greiðir frá, at summi arbeiðsumhvørvi eru perfekt hjá psykopatinum at spjaða sítt eitur í.

Samvitskuleysu superegoistarnir stórtrívast til dømis í modernaðum, fleksiblum organisatiónum. Eisini á arbeiðsplássum, har alt er eitt sindur kaotiskt frammanundan. Til dømis har stórar broytingar verða framdar, eitt nú í sambandi við umleggingar, samanleggingar, uppkeyp og aðrar stórar broytingar.

Harafturímóti gongur psykopaturin uttan um gamlar, bureaukratiskar skipanir, har reglur og mannagongdir eru fastlagdar, og vandin fyri at verða avdúkaður er stórur.

Í summum førum líkist psykopaturin tí egoistiska narcissistinum. Báðir hava ómetaliga stórt sjálvsvirði, lítlan kensluligan intelligens og halda seg kunna liva omanfyri reglurnar, sum galda fyri onnur.

Men munurin millum teir báðar er, at narcissiturin hevur samvitsku, kann vera í iva og angra illgerðir sínar. Tað kann psykopaturin ikki.

Í summum førum kann vera ein fyrimunur at hava ein narcissistiskan topleiðara. Hetta kann vera í sambandi við stór sparitiltøk, ella tá nógv fólk skulu sigast úr starvi.

Men tað er ongantíð ein fyrimunur at hava ein psykopat í starvi. Hann er óútrokniligur og tænir bara einum harra: sær sjálvum og sínum egnu áhugamálum. Og hann himprast ikki fyri at at brúka øll hugsandi og óhugsandi vápn fyri at røkka málinum, sum hann hevur sett sær.

Av tí at psykopaturin hevur so stórt sjálvsálit, dugir at taka skjótar avgerðir, eisini tá ið tær fáa svárar avleiðingar fyri starvsfelagarnar, fær hann ofta gott fótafesti í karrieruni. Tí nær hann ofta at krúpa eitt gott petti upp eftir karrierustiganum – men bara til eitt vist.

Hevur psykopaturin smikrað og manipulerað seg til ein høgan sess í fyritøkuni ella felagnum, kann tað fáa fatalar avleiðingar fyri eitt nú fíggjarstøðuna. Tí er psykopaturin ofta ódrúgvur í starvinum.

– Teir verða avdúkaðir av sínum risastóra ego. Sum oftast eydnast tað teimum at snúgva seg burtur úr truplum støðum, men brádliga verða teir avdúkaðir, sigur Sanne Udsen. Og hon staðfestir, at hetta eisini er orsøkin til, at psykopatarnir sjáldan eru umboðaðir í topleiðslum. Snøgt sagt, tí teir halda ikki so leingi og megna heldur ikki at gera arbeiðið til lítar.

## Renn avstað!

Men hvussu skulu vit gera, um vit hava illgruna um, at ein psykopatur ger um seg í nærumhvørvinum?

Um tú ikki hevur eina óvanliga sterka psyku og serligt innlit í psykopatar, umframt eitt krútsterkt bakland, er serfrøðin púra samd og avgjørd: flýggja!

Eisini mælir serfrøðin til, at tú lærir teg at finna og eyðmerkja psykopatar í umhvørvinum í góðari tíð. Bert soleiðis ber til at verja seg fyri teimum.

Og minst til: tú kanst ikki gera ein psykopat til eitt betri menniskja.

Hann er ólekiligur.

Hvørki heilivágur ella terapi rínur við, og tú hevur ongan kjans at vinna á honum í einum maktkampi.

Tú verður altíð veikari parturin, tí tú hevur bæði samvitsku og skuldarkenslur at dragast við. Kenslur, sum psykopaturin ikki hevur. Hann eirir ongum og gevst ikki, fyrr enn hann hevur vunnið – og vápnini eru markleys, líka frá útspilling til harðskap, forfylging og álvarslig lógarbrot.

Tí er bara ein leið, nevniliga tann sama, sum veiðumaðurin gav Snjóhvítu: renn avstað. Flýggja langt, langt burtur, og kom ongantíð aftur!

## FAKTA **PSYKOPAT**

Læknafrøðin góðtekur ikki heitið psykopatur. Nýggja, politiskt korrekta heitið er dys- ella antisosial persónligheit (Antisocial personality disorder, ASPD or APD). Men talan er framvegis um góðar gamaldags psykopatar.

Psykopatar hava hvørki samvitsku ella skuldarkenslu. Teir duga illa at liva upp til sosialar normar og skyldur, og uppføra seg sum heild avstumpað móti øðrum. Tí hevur hann eisini ilt við at knýta seg kensluliga til onnur menniskju. Hann hevur ofta tunglyndi og er ofta misnýtari av rúsdrekka ella rúsevnum.

Psykopaturin verður lætt frustreraður, aggressivur og kann gerast harðligur. Hann skyldar altíð upp á onnur, og burturforklárar negativar avleiðingar av egnum gerðum. Reglurnar, sum eru galdandi fyri onnur, eru ikki galdandi fyri psykopatin.

Hann hevur lítið tamarhald á sær sjálvum og kann brádliga fáa illsinnisherðindi, har hann kastar við pappírum ella lutum.

Eyðkennið »psykopati« kemur ofta til sjóndar longu í ungdómsárunum, og tað ger mest um seg hjá ungum fólkum. Eyðkennini vikna so líðandi gjøgnum lívið.

Sjúkueyðkennini hava ikki einans trupulleikar í umhvørvinum við sær. Eisini fær viðkomandi ofta eitt óstøðugt lív við nógvum og skiftandi partnarum, og ofta eisini kriminaliteti. Ein stórur meiriluti av teimum, sum enda í fongsli, eru psykopatar.

Fleiri mannfólk enn kvinnur eru psykopatar.